

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 05 - 2012

# Atlantic Petroleum rakt við olju

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum boðar nú frá, at boringin á Orchid leitimiðinum í Norðsjónum er liðug. Ben Arabo, stjóri sigur í stuttari viðmerking, at úrslitið er positivt, (encouraging) men enn vænta upplýsingar, sum kunnu siga, um fundið er lønandi. Olja er staðfest í 280 føtur tjúkkum lagi av kálki. Nú verður so roknað uppá møguligu nøgdirnar av olju, sum kunnu vera í kálklagnum, og um tað er loysir seg at bora ein avmarkingar- og metingarbrunn. Tað er sostatt ikki ein spurningur, um olja er tilsteðar, men hvussu nógv olja er har. Ben Arabo sigur við oljan.fo, at tað hevði verið negativt, um brunnurin var turrur. Orchid brunnurin er ein í eini røð av leitibrunnum, sum Atlantic Petroleum borar í ár og næsta ár. Fyristøðufelag fyri brunnin er Summit Petroleum við 45%, Valiant (30%), Trap Oil (15%) and Atlantic Petroleum (10%). Tað seinasta - Tíðindaskriv frá Atlantic Petroleum - Atlantic Petroleum funnið olju í Orchid brunninum Atlantic Petroleum boðar í tíðindaskrivi í dag frá, at felagið hevur funnið olju í Orchid leitibrunninum 29/1c-9 í loyvi P.1556, ið liggur í enska partinum av norðsjónum. Kanningar av brunninum staðfesta, at olja er til staðar í eini kálk formatión, og brunnurin verður nú afturlatin. Brunnurin varð boraður við boripallinum Sedco 711. Dýpið, har brunnurin liggur, er umleið 290 føtur, og tvey framleiðandi felt, Bittern og Kyle, liggja nærhendis. Tvey mið vóru í brunninum, og olja var funnin í eini kálk flá. Fláin er meira enn 280 føtur til hæddar, og olja varð staðfest við einum miðal poknusstigið sum er 30%. Nærri kanningar av fundinum skulu gerast fyri at staðfesta støddina, og um fleiri brunnar skulu borast. Summit Petroleum er fyristøðufelag, og eigur 45% í loyvinum. Atlantic Petroleum keypti seg inn í loyvið í 2011, og eigur 10%. Onnur samstarvsfeløg eru Valiant Petroleum (30%) og Trap Oil (15%). Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum - Úrslitið av boringini er gott, men neyvari kanningar skulu gerast

fyri at staðfesta um fundið er rakstrarvert. Vit fara nú, saman við okkara samstarvsfeløgum, at greina teir upplýsingarnar, ið boringin hevur givið okkum.